### Vanligir tjóðveldismenn og onnur

Klingran í Norðurlandahúsinum verður í kvøld, mikukvøldið tann 16. juni klokkan 19.00, karmur um kvøldsetu, sum Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag. Sagt verður, at tað verða ikki politikarar, sum fara at røða á kvøldsetuni, men vanlig fólk; vanlig fólk, sum arbeiða í kommununi og hjá kommununi, og sum "hava dagligt samband og samskifti við havnarfólk og vitjandi í býnum." Nomið verður við evni sum heilsu, trivnað, samferðslu, umhvørvi, mentan og menning. Skráin er ikki drúgv, tí allar røðurnar eru um tíggju minuttir. Røðararar eru Súsanna á Brúsoyri, Johan í Kollafirði, Wanja Petersen, Ingigerð á Trøðni, Finnur Jensen og Asta Hjelm.

**hkm**

# Forða fyri at føroyska flaggið kemur í ringt orð

*Í seinasta lagi skulu føroysk farmaskip yvir 500 tons, lúka ávís krøv, ella missa tey siglingsloyvi, sigur Skipaeftirlitið*
*savnsmynd*




**Farmaskip, sum ikki lúka ávís krøv í seinasta lagi 1. juli, missa siglingsloyvið, sigur Skipaeftirlitið**

VERND ÍMÓTI YVIRGANGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu ávísar reglar setast í verk, fyri at verja skip ímóti yvirgangi.

Talan er um altjóða reglugerðina, sum nevnist "International Ship and Port Facility Code", eisini stytt ISPS - ásetingin.

Skipaeftirlitið sigur, at øll føroysk farmaskip yvir 500 BT, skulu lúka krøvini í ásetingini í seinasta lagi hin 30. juni.

- Í altjóða høpi hevur verið tosað í fleiri ár um at gera eina reglugerð um tilbúgving og vernd móti yvirgangi. Atsóknin í USA hin 11. september 2001 setti ferð á fyrireikingarnar og altjóða kravið er, at øll skip og allar havnir, ið eru umfataði av ásetingini, skulu hava váttan frá avvarðandi myndugleikum, at tey lúka krøvini.

Skipaeftirlitið sigur, at skip sum ikki lúka krøvini hin 1. juli í ár, missa siglingsloyvið.

- Hetta verður gjørt fyri at tryggja at føroyska flaggið ikki kemur í ringt orð. Verður tað lopið út í orð, at onkur føroysk skip ikki lúka krøvini, kann tað verða ein forðing hjá teimum, ið lúka tey.

Skipaeftirlitið sigur, at koma føroysk skip fyrst undir slíka ringa umtalu, ber tað í sær, at útlendskir myndugleikar koma at halda serligt eyga við føroyskum skipum.

- Slíkt hert eftirlit kann seinka skipunum munandi.

### Hetlendsk tónleikavitjan

ORKESTURVITJAN

Í hesum døgum vitjar eitt seksmannað hetlendskt orkestur í Føroyumm. Orkestri fer leygakvøldið hetlendskan og skotskan fólkatónleik á Vertshúsinum

Av Vetrshúsinum siga tey, at tey fara at gera nógv burtur úr tónleikavitjanum.

– Reaktiónirnar upp á at Vershusið hevur broytt eitt sindur av liti hava verið sera positivar, og er nýta nógv fólk høvi at vitja inn á gólvið, siga tey á Vertshúsinum í tíðindaskrivi.

# Gamlir menn úr Ølstaði

Tann 1. juli kemur tónleikabólkur úr Ølsted til Føroya at spæla. Bólkurin eitur Gamle Venner, og limir eru fyrst og fremst pensionistar. Teir fara at spæla í Korndalsbýlinum á Eiði tann 1. juli, og dagin eftir verða teir á Lágargarði í Havn. Tann 5. juli gongur leiðin inn á Ellisheimið í Vágum, og dagin eftir tað er ætlanin at spæla fyri pensionistum í Eydnuni á Oyrabakka. Tann 7. juli verður rundað av norðuri í Klaksvík, har Áhugabólkurin fyri eldri í Norðoyggjum skipar fyri.



*Gamle Venner høvdu fyri tveimum árum síðani konsert í Tjørnuvík. Á myndini eru tað teir tríggir Svend Krogshede (til vinstru), Christian Peder Honoré og Mogens Tage Hansen*

Tónleikurin hjá Gamle Venner er alt frá gomlum vísum til polka til nýmótans evergreens. Onkrir føroyskir sangir verða eisini á skránni.

- Okkara tónleikur hevur altíð havt góðar karmar at virka undir í Føroyum. Eg kenni tað soleiðis, at føroyingar hava eitt gott tev fyri sangi og siðbundnum tónleiki, sum vit dáma at spæla, sigur Christian Peder Honoré, violinistur og leiðari í Gamle Venner.

**hkm**

# Kaupthing Banki keypir danska bankan FIH

**Kaupthing Banki hevur gjørt eina avtalu við Förenings-banken, svenski eigaran av FI-Holding ella FIH, um at keypa øll partabrøvini í FIH fyri kr 7,1 mia.**

BÚSKAPUR
*Tíðindaskriv*

Strategiskt hóskar FIH sera væl saman við Kaupthing Banka, og keypið, ið tvífaldar støddina á Kaupthing Banka, fer at geva Kaupthing Banka eina leiðandi støðu á danska vinnulívsbankaøkinum.

FIH fíggjar danska vinnulívið og hevur seinastu árini vunnið 17% av danska marknaðinum á hesum økinum. Teir umleið 5.000 kundarnir hjá FIH, fevna í høvuðsheitinum um stór, miðalstór og smærri donsk virkir. FIH hevur ein sterkan kapitalbygnað og hevur verið kent fyri, at hava sera fá tap av teirra útlánsvirksemi.



*Í Føroyum heldur Kaupthing til á Tinghúsvegnum í Havn*

Keypið av FIH er eitt framhald av virkisætlanini um at vaksa á vinnulívsbankaøkinum og at víðka um virksemið á Norðurlondum. Samanlagda felagið verður ein grundarsteinur fyri komandi vøkstri innan vinnutænastur og sokallaðum private equity íløgum.

Samlaði javnin á Kaupthing Banka økist úr kr 51.3 mia kr í kr 118,2 mia eftir keypið av FIH. Verða netto inntøkurnar á báðum feløgunum samanlagdar vóru hesar í 2003 kr 1.210 mió og í 1. ársfjórðingi 2004 kr 411 mió.



# Pizza Aage kann verða dømdur aftur

**Pizzakokkurin í Klaksvík, sum noktar at gera mat til týsk og fronsk ferðafólk, kann verða dømdur aftur, um hann verður meldaður. Sama lóg, sum hann var dømdur eftir í Danmark í fjør, er galdandi í Føroyum**

PIZZA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Í fjør varð danski pizzakokkurin Niels Aage Bjerre, sum eisini er kendur undir navninum Pizza Aage, dømdur átta dagar í fongsul fyri brot á rasudiskriminatiónina.

Orsøkin til dómin var, at hann noktaði at gera mat til týsk og fronsk ferðafólk, sum vitjaðu á hansara pizzaria á Fanø. Hetta hevði Pizza Aage ikki loyvi til, og Eystari Landsrættur dømdi hann tí fongsulsrevsing.



Pizza Aage skýrdi dómin at verða láturligan, og hann hevur síðani heldur ikki broytt hugsan um, hvørji fólk hann vil gera pizzur til. Nú starvast Pizza Aage á Pizzaria Napoli í Klaksvík, og har fáa týsk og fronsk ferðafólk at greitt at vita, at tey fáa ongan mat frá honum. Hetta tí at stjórnirnar í hesum báðum londunum ikki taka undir við USA og Danmark í krígnum í Irak

### Sama brot í Føroyum

Lógin, sum Pizza Aage varð dømdur eftir í Danmark, er eisini galdandi fyri Føroyar. Hon varð sett í gildi í Føroyum í august mánaði í 1972 uttan broytingar frá tí donsku lógini.

Grein eitt í hesi lógini sigur, at tann sum innan fyri vinnuligt ella alment virksemi orsakað av rasu, húðaliti, tjóðskaparligum ella etniskum uppruna ella trúgv noktar at tæna ella avgreiða viðkomandi undir somu fortreytum sum onnur, verður revsaður við bót, hefti ella upp til seks mánaðar í fongsli.

Sostatt er tað, sum Pizza Aage ger í Klaksvík líka ólógligt í Føroyum, sum tað var í Danmark.

So er spurningurin bara, um hann fer at halda fram við hesum í Føroyum, um nakar fer at melda hann aftur, ella um hann fer at broyta hugburð til hetta málið.

# Kann ikki góðtakast

**Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, er als ikki fegin um støðuna, sum hevur tikið seg upp við pizzakokkinum í Klaksvík. Hann sigur, at hann kann ikki liva við, at ferðafólk koma til Klaksvíkar og fara vónbrotin og órættvíst viðfarin avstað aftur**

PIZZA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
– Eg haldi í fyrstu atløgu, at bólturin liggur hjá Njál Reinert Petersen, sum jú er arbeiðsgevari hjá manninum, sigur Steinbjørn Jacobsen. Sostatt heldur hann ikki, at tað er ein uppgáva hjá kommununi at fara inn í hetta málið, men hinvegin sigur hann, at hann fer at halda eitt vakið eyga við gongdini í hesum málinum.

– Hetta er ómetaliga óheppið fyri Klaksvík og ein álvarslig støða, heldur borgarstjórin.

Og hann sigur, at hann ikki kann liva við hesum, og tekur hann frástøðu frá øllum tílíkum.



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at hann als ikki kann liva við, at ferðafólk verða órættvíst viðfarin í Klaksvík*

### Øll vælkomin

– Øll eru vælkomin til Klaksvíkar, her skal ikki munur verða gjørdur á hvørki ferðafólki ella øðrum – óansæð, slær Steinbjørn Jacobsen fast.

Borgarstjórin hevur ikki kannað á hvørjum støði hann kann fara inn og gera nakað við máli, men hann sigur, at hann fer at taka tað upp, um ikki vend kemur í.

– Hetta rakar jú ikki bara Klaksvík, men allar Føroyar. Og fyrst og fremst Pizzaria Napoli. Og tí haldi eg, besta loysnin hevði verið, at um maðurin ikki broytir støðu, at eigarin av matstovuni ger tað, sum hann kann og hevur heimild til, sigur Steinbjørn.

Steinbjørn Jacobsen heldur fram, at hann ikki veit, hvussu lætt tað er at finna pizzakokkar, og um hetta møguliga kann merkja, at Njál noyðist at siga manninum upp og harvið lata aftur, tí ongin annar kokkur er at fáa.

– Eg veit, at tað eru mong í Klaksvík, sum eru glað fyri at kunna fara út at eta pizza, og tann møguleikan missa tey, um so verður. Men heldur gjalda tann prísin enn rasismu, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Njál Reinert Petersen vil framvegis onki siga um hetta málið.

– Eg havi ikki tikið nakra støðu í hesum málinum, so eg havi framvegis onki at siga til hetta, er einasta viðmerkingin, sum eigarin av Pizzaria Napoli, hevur.

# Amariel Norðoy í Leikalund



*Nú fáa norðoyingar høvi at síggja list frá Amariel Norðoy. Hann hevur málningaframsýning í Leikalund til hálvan juli*

**Fríggjadagin 18. juni letur Amariel Norðoy upp málningaframsýning í Leikalund í Klaksvík**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Nú er langt síðani at klaksvíksfólk hava haft møguleikan til at síggja myndirnar hjá bygdamanninum, Amariel Norðoy, sýndar fram í Klaksvík, men nú hava tey høvi til tess.

Tema fyri hesa framsýning er tað skiftandi ljósið og við á framsýningini hevur Amariel oljumálningar og skravumyndir.

Framsýningin letur sum sagt upp fríggjadagin 18. juni klokkan 16.00, har øll eru hjartaliga vælkomin at hyggja inn, síggja framsýningina, fáa ein kaffimunn og heilsa uppá listarmannin. Myndirnar eru til sølu og eru at síggja í vanligari upplatingartíð frá mánadag til fríggjadag frá 10 til 17:30 og leygardag frá 10 til 13. Framsýningin verður hangandi 1 mánaða inntil 19. juli.

Framsýningin, ið tekur við aftaná Amariel, verður við myndum hjá Jóruni Høgnesen. Hon sýnir fram í Leikalund frá fríggjadegnum 23. juli.